**Starv**

# Samferðsluleiðari




Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir einum leiðara til samferðsludeildina.

**Samferðsludeildin**
Uppgávan hjá Samferðsludeildini er at samskipa og menna fólkaflutningstænastuna hjá Strandferðsluni. Arbeiðsøkini eru: ferðaætlan, ferðaseðlaskipanir, samskipan og samferðslukunning.

**Uppgávurnar hjá leiðaranum**
Samferðsluleiðarin er leiðari fyri teimum 6 fólkunum, sum starvast á deildini. Leiðarin skal tryggja ein effektivan rakstur, og áseta og stýra fíggjarligu karmunum innan tænastuframleiðsluna. Harumframt skal leiðarin tryggja framhaldandi menning av deildini.

**Førleikakrøv**
- Hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni t.d. verkfrøðingur ella búskaparfrøðingur.
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi flutningsskipanum.
- Kunnleiki og royndir innan edv á høgum brúkarastøði.
- Royndir í projektleiðslu.
- Arbeiðir miðvíst og hevur analytisk evni.
- Góð leiðslu- og samstarvsevni.
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt leiðarastarv við stórum og spennandi avbjóðingum, har leiðarin fær ábyrgdina av at menna eina týdningarmikla funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.
Starvið er lønt eftir sáttmála millum avarðandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið, ella í 35. lønarflokki hjá tænastumannafelagnum, tó uttan at starvið er tænastumannastarv.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:
Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 22. juli 2004. Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Kristian Davidsen, stjóra, ella Johnni Poulsen, fíggjarleiðara. Tlf. 34 30 00

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

REPROZ

# Summarfrí

19. juli - 6. august

Vegna summarfrí er avgreiðslan stongd frá mánadegnum 19. juli til fríggjadagin 6. august, báðir dagar íroknaðir.

Telefonavgreiðslan er tó opin mánadag til fríggjadag kl. 10:00 - 12:00. Eisini er møguligt at seta seg í samband við Barsilsskipanina um telefax ella teldupost.

**Barsilsskipanin**

Barsilsskipanin · Smyrilsvegur 20 · 100 Tórshavn
Tel 35 35 55 · Fax 35 35 56 · barsil@barsil.fo
www.barsil.fo

# Arbeiðshandskar

**til øll endamál - bæði á sjógvi og landi**

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar

**ADC-Heilsølan** spf

Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo

Sosialurin 311820

# SEIGUR 1210 frá 2003



Skjótasti útróðrarbátur í Føroyum oman fyri 10 BT til sølu við fiskiloyvi.

Mesta ferð 28 knob.

Sí lýsing á www.batur.fo

**Tlf. 218292 ella 228741**



FØROYAPRENT · TEL. 314 555

# HÚS TIL SØLU

**Í Norðragøtu** Húsini eru um 70m² til støddar, og eru í 3 hæddum

**Kjallararhædd:** durur, gongd, 2 kømur og 2 kjallararúm.
**Miðhædd:** gongd, wc, vaskirúm, køkur og stova.
**Loftshædd:** gongd, 2 kømur og klædnakamar.

Húsini eru bygd í 1964, hava plast vindeygu, og eru annars nýliga umvæld, so sum nýggjan klædning og tak.
Húsini verða seld um nøktandi boð fæst.

Ring 44 12 11 ella 28 12 11



**SUNNUDAGSDØGURÐI Á HOTEL NORÐ**

**Sunnudagin 18. juli er matarskráin hendan:**

· Fesk súpan v/flutes

· Heilstokt lambasteik v/gularótum, hvítleykssauté og sós

· Kokubuffet við fleiri sløgum

**Ring og bílegg borð á tel 45 12 44**

Sosialurin 311800

**Hotel Norð**

TEL 45 12 44 · FAX 45 12 45 · FO-750 VIÐAREIÐI

# Summarfrí

Skrivstovan er stongd í viku 31, frá 24. juli til 2. august 2004.

**Føroya Arbeiðarafelag**





# Starv

## í bókhaldinum á Føroya Gjaldstovu

Í sambandi við verkætlan, ið umfatar scanning av fakturum, verður eitt starv í bókhaldinum á gjaldstovuni leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðsheitum:**
- scanning av fakturum
- skráseting av kreditorum,
- skráseting av útlendskum gjaldoyra,
- skráseting av afturvendandi rokningum,
- skráseting í høvuðsbókhaldi,
- avgreiða fyrispurningar m.a. um útgjaldingar,
- vegleiða stovnar í ymsum fyrispurningum,
- leita fram skjøl og arkivera.

Viðkomandi kann verða settur til onnur arbeiði innan roknskaparhaldið, um leiðslan metir hetta verða neyðugt.

**Krøv til starvið:**
Hægri handilsskúli e.t. og/ella viðkomandi arbeiðsroyndir. Tað týdningarmesta er, at viðkomandi skilir væl bókhald, hevur góðan ordan í sínum arbeiði og hevur lætt við at hava yvirlit. Arbeiðið á stovninum er í stóran mun skipað í bólkum. Tí skal tann, ið settur verður, hava góð samstarvsevni og gera sítt til, at bólkurin arbeiðir væl saman.

Gjaldstovan kann bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har tað verður brúkt framkomin EDV-amboð.

**Setanarviðurskifti:**
Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna, og starvið eru lønt samb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í Bólki II. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Augustinussen, sum er at hitta á tlf. 352460 ella 214960.

**Umsókn:**
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða sendar til Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 27. juli 2004.

---

*Á Gjaldstovuni starvast 30 fólk. Gjaldstovan rekur, viðlíkaheldur og mennir Búskaparskipan landsins. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar á fíggjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld lankskassans.*
*Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum.*

# Avgreiðslufólk

Til Farodane City sóknast vit eftir avgreiðslufólki innan skrivstovulutir at byrja skjótast gjørligt.

**Starvsøki:**
Sum partur av skrivstovumarknaðinum Farodane City fevnir starvsøki fyrst og fremst um sølu og tænastu innan skrivstovulutir - bæði við telefonavgreiðslu og í handlinum.

Saman við handilsleiðaranum kemur tú herumframt at hjálpa til við bíleggingum, vøruúrvæli, søluátøkum og aðrari menning av handlinum.

**Fyritreytir:**
Vit vænta at tú hevur royndir innan sølu og handil, við fyrimuni innan skrivstovulutir. Viðkomandi útbúgving er ein fyrimunur, tó at størstur dentur verður lagdur á at tú ert fyrikomandi og skyldurøkin. Herumframt vænta vit at tú ert teldukøn/ur á vanligum brúkarastøði.

**Vit kunnu bjóða:**
Tú kemur í eitt avbjóðandi starv, har tú fært eina sølu- og vøruúrvalsvenjing á høgum støði. Saman við nærum 50 starvsfeløgum kemur tú at mynda eina gamla, men nútímans fyritøku í støðugari menning.

Løn verður ásett í samráð við leiðsluna.

Skrivlig umsókn saman við viðmælum/prógvum skal verða okkum í hendi seinast mánadagin 26. juli 2004.

**FARODANE City**
SKRIVSTOVUMARKNAÐUR

*Farodane er 54 ára gamalt handils- og tænastuvirki, sum í dag er millum landsins fremstu heildarveitarar til skrivstovuna.*

*Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, skrivtovuinnbúgvi, skrivstovulutum, umframt skeiðstovuna Kvasir.*

Umsókn skal sendast til:
FARODANE P/F
Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311414
farodane@farodane.fo
www.farodane.fo

# Nólsoyar skúli

Vegna ov fáar umsóknir verður søkt eftir lærara til skúlaárið 2004/2005. Undirvísingarøkið verður í byrjunnarundirvísingini og/ella 4. til 9. fl. og nakrar tímar í serundirvísing/serligum tørvi.

Tímatalið verður væntandi 26 t/v vegna avlopstímar.

Starvið, sum er tíðaravmarkað skúlaárið 2004/05, verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá skúlaleiðaranum á tlf. 327119/527119.

Umsóknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi leygardagin 24. juli.

**Nólsoyar skúlastýri**
v/Annu Marnu Holm
FO-270 Nólsoy

# Bryggjudansur í Vágsbotni

Hin vælumtókti
**BRYGGJUDANSURIN**
hjá Tórshavnar Bátafelag, verður í
**Vágsbotni, leygardagin 24. juli kl. 21.00.**



Harmonikufelag Føroya fer at spæla góðan dansitónleik, eisini verður føroyskur dansur.

**Ábit fæst til keyps**

**Tórshavnar Bátafelag**

# Bátur til sølu



Skjóttgangandi bátur til sølu, siglir uml. 45 míl, motorurin er 75 HK Mariner og er umvældur fyri meira enn 15.000,- kr. Nýggj skrúva, tendring, generator v.m. Annars er motorurin gjøgnumgingin og er hann í ordan. Báturin er væl egnaður til vatnskíðir ella líknandi.

Prísuppskot 45.000,- ella har á leið.

**Tlf. 574200 ella 374201**




# Koyrikort

## til motorsúkklu?

Nýtt teoriskeið byrjar mánadagin 19. juli kl. 19.30.

**FØRARASETRIÐ**
KOYRISKÚLI

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
tel 21 10 99 • 21 10 96

**John A. Christiansen**
koyrilærari
tel 21 47 75

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

SISERO 351800